# Blaðið hjá ÁFH

Nr. 1 10. mars 1999 1. árgangur

# Bjølgurin



*Hilmar skrivar um fyrstu harmonikuna í Nólsoy*

# Leiðarin



Hetta er so okkara roynd við eini blaðútgávu. Burðurin hevur verði tungur. Tosað hevur verði um hetta blaðið í skjótt trí ár, men nú eydnaðist tað so endiliga. Nær næsta nummari av blaðnum kemur er ikki avgjørt enn. Vit hava so við hesum gjørt eina roynd. Vónandi fer komandi nevnd, ella aðrir limir at taka tráðin upp. Eingin sigur at tað skal verða nevndin, sum skal gerða alt arbeiðið við blaðútgávuni. Tað stendur nevndini frítt at heita á limirnar, ella at seta ein arbeiðsbólk til at taka sær av blaðútgávuni. Tað er tó nevndin, sum hevur ábyrgdina av blaðnum, so leingi tað hevur heitið *blaðið hjá ÁFH*. Hesa fer hava vit gjørt alt arbeiðið sjálvir. Eg vil heita á teir limir, sum hava áhuga, tíð og kreftir til at verða við í blaðútgávuni, um at stíga fram og gera vart við seg.

**Internet**

Í hesum tøknuligu tíðum hendur so nógv, so óalmindiliga skjótt. Nú tosa øll um internet, e-post, trant-a og hvat veit eg. Eg veit, at tað finnast snildingar innan tað tøknuliga í felagnum. Hevði tað ikki verið eitt gott hugskot, at fingið felagnum eina e-post-adressu og heimasíðu á internetinum? Á tann

Bjólgurin. Nr. 1 / mars 1999. Útgivið av: Áhugafelag fyri Føroyskar Harmonikuspælarar - postsmoga 1192 110 Tórshavn. Ábyrgdarblaðstjóri: Ísak Jacobsen. Tekstir: Heri, Hilmar, Fimmboði og Ísak. Prenta á egnum forlagi. Layout: Ísak og Fimmboði.

hátt hevði tað veri so nógv lættari hjá felagnum at gjørt vart við seg, víða um. Tað hevði eisini verði lættari hjá áhugaðum í øðrum londum, at koma í samband við okkum. Tit limir, ið hava hegni og hug, stingið høvdini saman og komi við einum uppskoti, ella eini lidnari loysn, men lat líka nevndina sleppa at siga gott fyri loysnini árðenn hon verður slept út á alnótina.

Ísak.



# Hilmar skrivar

Tað kundi verið áhugavert at vita nær fyrsta harmonikan kom til føroya. Í samband við at stevnan var í Nólsoy kom fram, at fyrsta harmonikan í Føroyum júst kom hertil. Hetta er tó ikki kannað.

Í 1846 fóru tríggir nólsoyingar Jógvan Jacobsen, Poul Joensen og Hans Pauli Johannesen til Danmarkar at tosa við kong og mótmæla tvungnari skúlagongd.

Ferðasambandið tá var ikki so lagaligt, so teir vóru í Danmark allan veturin. Henda veturin komu teir í samband við Sven Grundtvig, son sálmaskaldið N.F.S. Grundtvig, sum hevði stóran áhuga í føroyskari mentan.

Í Keypmannahavn lærdu teir nýggjar sálmar og nýggj sálmaløg.

Tá teir komu aftur til Nólsoyar í 1847 høvdu teir eina harmoniku við sær.

Jógvan Jacobsen fór nú at savna fólk heima hjá sær og lærdi tey nýggju sálmaløgini. Hann spældi løgini á harmonikuna. Í 1855 varð harmonikan brúkt í kirkjuni á fyrsta sinni saman við nýggju sálmabókini. Hon varð síðan nýtt í kirkjuni til høgtíðir og brúðarvígslur til endan av 1800talinum.



Harmonikan er tíverri ikki til longur. Tá loftið í einum gomlum húsum varð ruddað fyri fjóringsøld síðan, er hon uttan iva farin eysturav, sum vit siga herúti.

Elsta harmonikan í bygdini er nakað yngri, hon er keypt í 1907. Ein ungur nólsoyingur, Mikkjal Hansen, var við á dansiferð til Voss í 1907 og tá hevði hann eina harmoniku heimaftur við. Tað er hana vit síggja á myndini.

Hilmar.

# VIT LÍTA AFTUR UM BAK



Felagsvenjing á stóvnigardegnum í Nólsoy

Á harmonikutúrinum til Aberdeen á heysti 1996 var avgjørt at hava eitt harmonikutreff í Nólsoy.
Dagurin varð settur til 2. November 1996, tá var alt heystarbeiði liðugt.
Hetta vikuskiftið í Nólsoy hevði tvinni mál. - At hittast til samanspæl og hugna. Seta á stovn felag fyri harmonikuspælarar.
Ein nevnd var sett umborð á Smyrli, í henni vóru Fimmboði Lisberg, Pauli Jacobsen og Ísak Jacobsen. Teir høvdu fyrireikað dagin.
Kl. 11 var stovnandi aðalfundur. Fyrireikingarnevndin hevði evnað eitt lógaruppskot til, og var tað góðtikið á fundinum við heilt smáum broytingum.
Felagið var nú stovnað og nevnd vald, í hana komu Fimmboði Lisberg, Ísak Jacobsen og Hilmar Joensen. Navnið á felganum bleiv Áhugafelag fyri Føroyskar Harmonikuspælarar - stytt til ÁFH.
Endamálið hjá felagnum er at stuðla og menna harmonikuspæli og áhugan fyri harmonikutónleiki í Føroyum, men nevndin bað limirnar um hugskot til at náa hesum máli.
Nú var so bólkaarbeiði, og nevndin fekk nógv tilfar til sín arbeiðssetning. Her eru nøkur av hugskotunum. - Skipa fyri festivali. Fáa tilfar til vega - nótabanka. Skipa fyri konsertum. Fáa harmonikuundirvísing í Føroya Musikkskúla. Fáa gestaspælarar hendavegin. Út á bygd at spæla. Skipa fyri túri uttanlands. Kontakta onnur harmonikufeløg. Kanna servismøguleikar. Upptøkur til útvarpið. Skeiðvirksemi. Geva út blað.
Hetta er nakað av tí, sum kom fram. Ikki serliga hugaligur lestnaður tá hugsað verður um hvat nevndin hevur avrikað.
Nakað seinka var so ábit í fimleikahøllini, og kom hetta væl við aftaná aðalfundin. Seinnapartin var "workshop", sum tað so fínt eitur. Evnini vóru bassspæl, seta besifringar til løg og gera undirstemmir til løg. Tíðin til hetta arbeiði var í so knøpp, orsakað av aðalfundinum.
Um kvøldið varð veitsla. Her í Nólsoy siga fólk hetta vera glaðastu veitslu tey vita um. Har var dansað og sungið áðrenn, undir og aftaná borhaldið.
Dansurin var um kvøldið í Royndarhúsinum, og ongantíð áður hava so nógvar harmonikur verið í húsinum. Ein vøkur sjón, at síggja 20 harmonikur standa á rað í salinum.
Samanumtikið var hetta eitt sera væl eydnað tiltak. Tað var sera hunaligt at hittast og læra hvør av øðrum, sum eisini er eitt av endamálm felagsins.

Hilmar.

# Lýsing

Sambært viðtøkum felagsins verður hervið lýst til aðalfund í Gamlaskúla á Oyrabakka, leygardagin 17. apríl 1999 kl. 18. Mál, ið skulu viðgerðast á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi 14 dagar áðrenn fundin.

Áhugafelag fyri Føroyskar Harmonikusælarar

**ÁFH**

# VIÐTØKURNAR HJÁ ÁFH

§ 1 Navn.
Navn felagsins er: Áhugafelag fyri Føroyskar Harmonikutónleikarar.
Stytt ÁFH

§ 2 Endamál.
Endamál felagsins er at stuðla og menna harmonikusplæli og áhugan fyri harmonikutónleiki í føroyum.

§ 3 Limaskapur.
Limur í felagnum kann ein og hvør gerðast ið vil stuðla endamáli felagsins og ganga undir lógir og reglur felagsins. Limur í felagnum er ein og hvør ið hevur goldið limagjald.

§ 4 Skipan felagsins.
Aðalfundurin verður hildin á hvørjum ári. Aðalfundurin er hægsti mynduleiki felagsins. Dagsskráðin á aðalfundi er:

1. Val av orðstýrara eftir uppskoti frá nevndini.
2. Val av fundarskrivara eftir uppskoti frá nevndini.
3. Formansfrágreiðing um virksemi felagsins í farna ári.
4. Framløga av grannskoðaðum roknskapi til góðkenningar.
5. Ásetan av limagjaldi.
6. Innkomin mál.
7. Val av tveimum nevndarlimun.
8. Val av grannskoðara, ið situr til næsta ársaðalfund.
9. Ymiskt.

Boðað skal verða til aðalfundar í minsta lagi 1 mánað áðrenn ásettan dag. Fundurin hevur avgerðarrætt uttan mun til tal av uppmøttum limum. Vanligur meirluti er galdandi, tó krevst 2/3 av uppmøttum limun í meirluta um lógarbroyting skal fremjast. Uppskot sum ikki eru nevndini í hendi seinast 14 dagar áðrenn aðalfundin, kunnu ikki koma til avgreiðslu. Tó er uppstilling av valevnum undantikin. Valevnir og nevndarlimir skulu vera 18 ár ella eldri og limir í felagnum.

Nevndin er samansett av einum formanni, kassameistara og skrivara. Tveir nevndarlimir standa fyri vali á hvørjum ári. Atkvøðugreiðslan við vali av nevndarlimun er skriftlig. Nevndin skipar seg sjálv. Kassameistarin skal føra roknskap yvir virki felagsins. Skrivarin skal føra gerðabók yvir virki felagsins. Gerðabókin skal liggja frammi til skoðan á aðalfundi.

Nevndin hevur dagligu leiðsluna av felagnum um hendi og hevur avgerðarrætt í øllum spurningum, sum ikki nýtast at koma fyri á aðalfundi. Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu og er vanligur meirluti galdandi. Til keyp og sølu av fastari ogn og skuldarbinding av felagnum upp á virði yvir 10.000 krónur, krevst aðalfundargóðkenning.
Eykaðalfundur kann vera hildin um meirlutin í nevndini ella 1/3 av limunum krevja hetta. Fráboðað skal verða til eykaaðalfund 14 dagar áðrenn ásettan dag.

§ 5 Avtøka av felagnum.
Felagið kann bert avtakast á einum aðalfundi við í minsta lagi 2/3 í meiriluta av uppmøttum limum. Um felagið verður avtikið fella ognir tess til Føroya Musikkskúla.

Viðtikið á stovnandi aðalfundi 2. November 1996 í Nólsoy.

---

**Aðalfundurin.**
Frá aðalfundinum, sum var hildin á treffinum í Hvalba 11, november 1997 hevur fundarskrivarin hesa frágreiðing:
Aðalfundurin í Hvalbiar skúla, leygardagin 11, november 1997, kl. 18:00. Á fundi møttu 18 limir.
**1.** Formaðurin, Fimmboði Lisberg, beyð vælkomin til ÁFH´s fyrsta aðalfund eftir stovnanina í Nólsoy 2. november 1996. Formaðurin skeyt upp at Ísak N. Jacobsen varð valdur orðstýrari.
Viðtikið.
**2.** Ísak takkaði fyri álitið og skeyt upp at Heri Ellingsgaard varð valdur skrivari á fundinum.
Viðtikið.
**3.** Fimmboði greiddi frá felagsins virki í farna árinum. Tað er ikki so nógv farið fram, men nevndin arbeiðir við ymiskum málum. Nevnt varð útgáva av blaðið og vitjan av lærara. Fundarvirksemi hevur ikki verði tað stóra, men nevndin hevur skipað fyri hesum "treffi" í Hvalba, og somuleiðis var skipað fyri "treffi" í Klaksvík fyrr í ár.
**4.** Grannskoðaður roknskapur varð framlagdur, gjøgnumgingin og góðkendur av limunum.
**5.** Limagjaldið verður framhaldandi kr. 100,00 pr. ár.
**6.** Innkomin mál: Einki mál innkomið áðrenn freistin var úti.
**7.** Nevndin varð einmælt afturvald.
**8.** Grannskoðarin, Eyðfinn Guðjónson varð afturvaldur.
**9.** Ymiskt: Sum heild eru limirnir væl nøgdir við felagsskapin. Semja tykist verða um at aktivitetirnir ikki nýtast at verða teir stóru. Tað at felagið er sett á stovn, at skipað verður fyri árligum fundi, sum samstundis er spæli-treff, er gagnligt fyri spælarnar, og krøvini eru ikki størri enn tað sama. Nevndin fekk tí fullan stuðul, og eitthvørt tiltak útyvir tað vanliga, verður høgt mett av limunum. Menn prá-



Nevndin: Hilmar, Fimmboði og Ísak á fundi.

# STUBBAR

**Búðmerkjakapping**

Nevndin hevur avgjørt at bjóða limunum til eina búðmerkjakapping. Vit høvdu hugsa okkum eitt búðmerki, ið lýsir virksemið og endamálið hjá felagnum. Búðmerkið kann vera í litum, men skal eisini kunna brúkast svart og hvítt. Ætlanin er á komandi aðalfundi at vísa fram tey innkomnu uppskotini. Limirnir kunnu síðani atkvøða um hvat av uppskotunum skal verða búðmerkið hjá ÁFH. Skotbráðið er ikki stórt, ein góður mánaði ella so, men tað er eingin innlætingarfreist. Uppskotini skulu bert vera nevndini í hendi áðrenn atkvøðugreiðslan fer fram.

**Skriva**

Tað hevði verið áhugavert at frætt tíðindi, hugskot og annað frá limunum, sum kundi komið í blaðið, so skrivi endiliga til okkara.

**Postsmogan**

Felagið hevur fingið egna postsmogu: Postsmoga 1192 - FO 110 Tórshavn.

**Giro**

Felagið hevur eisini fingið girokonto:
Giro nr. 78093.

**Stovningin**

Øll viðurskifti við almennu myndugleikarnar, í samband við stovnanina av felagnum, eru nú komin í rættlag.

Ísak

---

taðu óført eina løtu um ymisk felags áhugamál. Niðanfyri verður nevnt nakað av tí, ið kom fram í hesum kjaki.

**Róðin Thomsen** skeyt upp, at navn felagsins verður broytt soleiðis, at bókstavirnir - ið koma afturat Áhugafelag, t.v.s. Áhugafelagið.... ella at felagið rætt og slætt verður kalla Harmonikufelagið.

**Ísak** vísti á at slíkt uppskot skuldi havt verið nevndini í hendi 14 dagar áðrenn aðalfundin, og málið varð tí útsett í fyrstu atløgu.

**Óli Johannesen** vísti á, at musikskúlarnir í føroyum eiga at verða gjørdir varugir við felagið og áhugamálini hjá spælarunum. Fimmboði skeyt upp at nevndin skrivar til musikskúlan, har kunnað verður um felagið og limalistin verður hjálagdur. Hettar fekk fulla undirtøku.

**Eiler Rasmussen** skeyt upp, at nevndin velur nakrar sangir út, sum allir spælarar kunnu spæla í felag.

**Ísak** staðfesti, at 16 ”gamlir” limir eru møttir á fundi, og at 2 nýggir limir eru møttir og teknaðir á fundinum. Eisini varð limur teknaður, ið ikki var á fundi. Felagið hevur sostatt 36 limir íalt.

**Høgni Mikkelsen** vísti á, at felagið kundi sett sær sum mál, at skapa áhuga millum ungfólk at spæla harmoniku. Flestu spælarar eru komnir væl upp í árini.
Breið semja!!

**Erlant Jacobsen** heitti á limirnar um at finna fleiri fólk, ið høvdu áhuga at gerast limir.

**Fimmboði** heilsaði frá Aðalstein Magnussen, sum ikki fekk verið við á fundinum.

**Juel J. Høgnesen** heitti á nevndina um at skipa fyri tiltøkum við tí fyri eyga, at fáa pening í felagskassan. Tosa var eina løtu um hetta mál, m.a. varð nevnt, at søkjast kundi til onkrar grunnar um stuðul. Semja er um at felagið upparbeiðir ein minni kapital, ið m.a. kann nýtast til vitjanir úr útheiminum. Tosað varð um dansitiltøk o.a.

**Ísak** greiddi frá at felagið ikki er undir mvg-skyldu.

**Fimmboði** greiddi frá um blaðið, sum fer at koma út í næstum. Fimmboði sjálvur og Ísak arbeiða við projektinum, sum ikki verður kostnaðarmikið og sum kallast ”Bjólgurin”. Báðir heittu á limirnar um at skriva okkurt til blaðið.

**Hóraldur** fregnaðist um blaðið og skeyt upp, at okkurt lag kom við í fyrstu útgávuna.

**Ísak** segði at blaðið í fystu atløgu kemur út einaferð. Er viljin hinvegin til staðar, og menn vilja skriva, er møguleiki fyri, at blaðið kann halda á við at koma út. Fyrsta útgávan er tyngst at arbeiða við. Tá grundtilfarið er lagt á telduna, ber væl til at arbeiða víðari við næstu útgávu.

Fimmboði og Ísak takkaðu fyri góðan fundarsið.

Fundurin lokin kl. 19:15.

Heri Ellingsgaard, skrivari á aðalfundinum.



# 5)

**Hann lærdi Sharon at spæla tveyradara.**

Einaferð vit fyrireiðkaðu ein harmonikutúr við Norrønu, barst mær fyri oyra at Sharon Weiss spældi uppá tveyradara.

Í sambandi vit at fløgan "Grannar" kom út herfyri, var samkoma í Norðurlandahúsinum, sum eg hevði tann heiður at verða boðin við til. Har møtti eg Sharon, og spurdi hana um hetta var so. Jú sigur hon – hon hevur einaferð spælt tveyradara, men av heilsuligum orsøkum lá ikki so væl fyri at viðlíkahalda spælið. Vit prátaðu góða løtu um leyst og fast, og so einaferð sigur hon: "Veitst tú forrestin hvør tað var, sum lærdi meg at spæla á tveyradara?" Tað visti eg sjálvandi ikki. "Jú" sigur hon "tað gjørdi Eyðun Andreassen!"

Eg hevði ilt við at trúgva hesum í fyrstani, men hinvegin - . Fyri ikki so langari tíð síðani, var eg í vertskapi saman við Eyðuni, og tá fekk eg ein greiðan varðhuga av at maðurin var sera musikalskur. Hann sang, sum ein annar sumbingur og legði annars lunnar undir eina sera hugnaliga, spontana sangløtu í gomlu dansistovuni í Sumba. Tí var eg ikki í iva um, at sjálvandi spældi hann eisini uppá okkurt ljóðføri, so hví ikki tveyradara?

Í øllum førum mátti hetta kannast nærri, so eg gjørdi ikki mætari enn at spyrja Eyðun sjálvan. Hann er lítilátin maður, og bleiv eitt sindur skakkur av spurninginum.

"So – sigur hon tað" var hansara fyrsta viðmerking, so fór hann at flenna. "Lært og lært – eg vísti henni okkurt einaferð."

Eg spurdi um hann spældi enn. Men tað eru minst tíggju á síðani seinast, so fingrarnir eru ikki í røttu venjingini í løtuni.

Upprunaliga byrjaði hann at spæla yviri í Noregi. Har hevði hann ein vinmann, Ingi, sum var sera kringur at spæla á



tveyradara. Annars vóru so nógv, sum spældu hetta ljóðføri har um vegir. Eyðun var so hugtikin av ljóðinum úr tveyradaranum, at hann bað vinmannin um at læra seg hetta spæl. Jú, so fóru báðir í býin at keypa tveyradara, Ingi lærdi Eyðun at spæla og nú stendur so tveyradarin í J.Nolsøesgøtu í Havn og verður at kalla ikki brúktur.

Hinvegin so kemur onkur tveyradari undan kavi av og á. Í Kvívík eru eini hjún, sum spæla hetta ljóðførið og onkur garvaður harmonikuspælari í Havn hevur eisini vant á tveyradara seinastu tíðina, men okkurt evni skal eisini verða til næsta blað.

5)

# Hvat hendir í 1999.

Tey flestu okkara eru so smátt farin at hugsa um hvussu summarfrítíðin skal leggjast til rættis, og vit fara tí at hyggja eitt sindur eftir hvørji harmonikutiltøk eru á skránni í ár, sum vit kenna til og hava møguleika fyri at luttaka í.

Ætlandi skuldi nevndin syrgja fyri at eitt treff bleiv hildið á hvørjum ári, og byrjanin var eisini góð. Fyrst vóru vit í Nólsoy í '96 síðani í Hvalba '97, men í '98 kom ongantíð nakað treff á skránna, men "fat mod - venner". Veturin er ikki liðugur enn, og vit *hava* eina innbjóðing á skránni.

Vit eru nevniliga boðin norður á Oyrabakka til harmonikutreff í vikuskiftinum 16. – 18. apríl, so tíðin er komin til at hála kuffertið út úr skápinum og fáa fríska luft í bjólgin aftur.

Skráin fer at líkjast undanfarnu. Vit møta fríggjakvøldið eftir útvarpstíð í Gamla Skúla á Oyri, har vit eisini koma at sova. Dagliga er Gamli Skúli karmur um skótavirksemið í bygdini, so har er tað inni, sum er neyðugt – ein lítil tekøkur, WC við brúsu, rúm til felagstiltøk umframt loftsrúm.

Klokkan 20:00 fáa vit ein drekkamunn og ein breyðbita og hugna okkum síðani við samanspæli og hvat vit annars kunnu finna uppá. Umframt skúlan og Eydnuna, fáa vit eisini høvi til at brúka svimjihylin, so tann, ið hevur hug at svimja, er vælkomin at taka svimjiklæðir við sær.

Annars hava vit ikki gjørt nakra neyvari avtalu við fyrireiðkarnar enn, men vit hava sagt teimum



# NÝGGJ FLØGA




Ein av virknastu harmonikubólkunum í landinum, Berg og Jacobsen's Dansiorkestur eru við á júst útkomni fløguni "Grannar".
Hetta er ein sera áhugaverd fløga, sum hevur harmonikutónleikin og málið hjá okkum og grannalondunum okkara sum høðvustema. Um nakar skuldi ivast, so lat tað verða sagt beinanvegin at tað er eingin annar enn Pauli Jacobsen, sum er stigtakarin til fløguna. Ongatíð bindur hann frið. Fleiri ferðir áður hevur hann sett varar í føroysku harmonikusøguna, og hetta verður neyvan tann seinasti.
Til útgávuna hevur Pauli leita sær stuðul frá Kristiani Blak umboðandi plátufelagið Tutl og Rakul Petersen umboðandi norðurlendska mentunnarsamtakið NORA.
Á fløguni er tónleikur úr Føroyum, Noregi, Skotlandi, Hetlandi, Orknoyggjum, Íslandi og Danmark.
Sum sagt er fløgan sera áhugaverd. Tað er stuttligt at hoyra tey ymisku málini, men samstundis hevur ein ilt við at skilja at hesir undarligu tekstirnir spretta úr sama upprunamáli. Í fororðunum til fløguna hevur málfrøðingurin, Jógvan í Lon Jacobsen, hugleiðingar um málið, sum undirbyggja hugskotið við fløguni.
Berg og Jacobsen's Dansiorkestur kemur hegnisliga frá teirra leikluti á fløguni og megna at lyfta støðið í føroyskum harmonikutónleiki eitt vet uppeftir. Her verður serliga hugsa um samanspælið, sum eisini ber tíðiligt brá av arrangeraðum tónleiki. Tað eru teir fýra Óli og Pauli Jacobsen, Erling Berg og Ólavur Magnussen, sum mynda bólkin.


Pauli Jacobsen

Á útgávuni luttekur eisini Hjalti Skaalum, sum gestatónleikari. Hjalti hevur eisini gjørt tað eina av løgunum – Ein føroysk mynd – og somuleiðis greiðir hann, í stuttum undanskrivi frá íblástrinum til lagið. Hitt føroyska lagið er "Gundadalsvalsurin", sum Óli Jacobsen hevur gjørt og halgað minninum um feðgarnar Carl og Ebbe Jularbo.

5)

---

frá hvussu vit vanliga verða bornir á lógvum, so vit seta okkara lít á teirra blíðskap.
Sum vanligt verður aðalfundurin leygarkvøldið, seinni koma vit at spæla skiftivís til dans, men harútyvir eru ongar bundnar uppgávur.
Fyri uttan tað ein vanliga vildi tikið við sær av klæðum, skóm og vaskigreiðum til eitt tílíkt vikuskiftisuppihald, skulu vit hava soviposa/dýnu og kodda við okkum (minnist til svimjibuksurnar).
Tað er ikki vist at nøkur onnur fráboðan kemur til túrin, annað enn møguligar lýsingar frá Eydnuni. Tí vilja vit her heita á tykkum um at boða okkum frá luttøku sum skjótast tó í seinasta lagi ***10. apríl.***
Íslendingar hava roynt at gera vart við seg. Onkrir vóru her í fjør, men vit gjørdu ikki nógv fyri at møta teimum. Á Norrønatúrinum í fjør varð boða frá einum ferðalagi, sum m.a. skuldi verða í Fuglafjørði, men tað vóru neyvan nógvir av okkum, sum nýtti høvið til at heilsa uppá teir, sjálvt um teir høvdu sett fram ynski um at møta føroyskum spælarum meðan teir vóru her.
Framhaldandi vilja íslendingar hava samband við okkum.
Reykjavik's Accordion Club kemur hendavegin til várs, og teir vilja fegnir hava samband við føroyskar kollegar. Vit kenna ikki dagfestingina enn, men havið eygu og oyru opin í meimánaði.
Somuleiðis hava vit frætt frá brøðrunum Jonatan og Inga Karlsson. Fyritøka teirra, General Agency / GenageMusic, skipar fyri fyrsta internationala harmonikufestivali í Íslandi nakrantíð smbr. skrivi, sum vit hava fingið frá teimum. Teir síggja fram til at møta føroyskum harmonikuspælarum á festivalinum, har teir annars vænta meginpartin av fremstu íslendsku harmonikuspælarunum eisini.
Festivalurin verður í vikuskiftinum 16. til 18. juli við Lake Reynisvatn, sum er uml. 15 min. koyring frá Reykjavík. Tann sum hevur internet kann fáa meira at

➔

vita um festivalin við at fara inn á: ***www.accordions.com/genage*** sum er teirra heimasíða. Annars eru tit vælkomnir at seta tykkum í samband við nevndina, fyri at fáa meira at vita um tiltakið.
Samstundis, sum hundadagarnir enda 23. august, byrjar árligi harmonikutúrurin við Norrønu til Bergens um Lerwick.
Túrurin í fjør eydnaðist sera væl, og umtalan hann síðani hevur fingið og ikki minst útvarpsins leiklutur, fara ivaleyst at síggjast aftur í ferðafólkatalinum komandi summar. Túrurin er vorðin kendur í londunum rundan um okkum, so væntandi verða onkrir útlendskir harmonikugestir eisini at síggja á komandi túrum. Í øllum førum


Ørvar Kristjánsson verður helst ein av teimum tú kanst rokna við at síggja við Reynsvatn í juli í ár.

skulu vit rokna við at hoyra hetlendskan tónleik á túrinum í ár. Hetlendski fólkatónleikarabólkurin Da Fustra við harmonikuspælaranum Peter Wood á odda verður við á næsta túri, og teir sigast at verða framúr góður bólkur.
Onnur tiltøk hava vit ikki beinleiðis frætt nakað um, men teir vanligu festivalirnir í londunum rundan um okkum vera óiva hildnir í ár sum undanfarin ár. Møguliga gera vit ein festivalkalendara í komandi útgávum, men fyribils hava vit, av góðum grundum, valt ikki at taka hann við.
Apropos festivalar – segði nakar Føroyar ár 2000???
Tað er ikki langt frá at onkur hevur nevnt okkurt um høllina á Hálsi í Havn.
Vit á redaktiónini hava roynt at eftirkanna hesi leysatíðindi, og er komnir eftir at høllin í øllum førum er útleiga til harmonikufestival í døgunum 26. til 28. mei ár 2000. Livst so spyrst!
5)

---

**Limalistin**

Ísak N. Jacobsen
Smærugøta 16 a - 100 Tórshavn

Pauli Jacobsen
Hetlandsvegur 10 - 100 Tórshavn

Fimmboði Lisberg
Mækjugøta 18 - 100 Tórshavn

Hilmar Joensen
270 Nólsoy

Jakup Mikkelsen
Stoksoyravegur 13 - 700 Klaksvík

Hans A. Poulsen
Bøgøta 15 - 700 Klaksvík

Flóvin Jacobsen
176 Velbastaður

Tór Hendriksen
210 Sandur

Óli Jacobsen
Gundadalsvegur 35 - 100 Tórshavn

Johannis Simonsen
Blákollugøta 5 - 100 Tórshavn

Finn Hansen
270 Nólsoy

Rene Hansen
270 Nólsoy

Óli Johannesen
530 Fuglafjørður

Ólavur Magnussen
Hvannkrókur 4 -100 Tórshavn

Erling Berg
Handaratún 5 - 100 Tórshavn

Heri Ellingsgaard
Oman Eið 10 - 700 Klaksvík

Róðin Thomsen
650 Toftir

Aðalstein Magnusson
Grótbrekka 5 - 700 Klaksvík

Martin Heldarskarð
Víkarvegur 34 - 700 Klaksvík

Tummas Heri Thomassen
380 Sørvágur

Eyðfinnur Guðjonson
Tórgarðsgøta 13 - 100 Tórshavn

Erland Jacobsen
Klaksvíksvegur - 700 Klaksvík

Eiler Rasmussen
Rættargøta 12 - 700 Klaksvík

Høgni Mikkelsen
niðan Horn 28 - 700 Klaksvík

Kristian Meitil
Heiðavegur 17 - 100 Tórshavn

Charles Gade
270 Nólsoy

Juul J. Høgnesen
520 Leirvík

Hóraldur Joensen
Nýggjagerði - 512 Norðagøtu

Ivan Holm
270 Nólsoy

Regin Jacobsen
Tórgarsgøta 11 - 100 Tórshavn

Hentzar Hammer
800 Tvøroyri

Oddgeir Jensson
826 Trongisvágur

Flemming Jespersen
800 Tvøroyri

Jákup Alberg Eliassen
520 Leirvík

Jónsvein Eliassen
520 Leirvík

Súni Eliassen
520 Leirvík

Tommy Olsen
Spógvavegur 15 - 100 Tórshavn




KODA. Hvat er hetta fyri ein felagsskapur? Hvørji rættindi og hvørjar skyldur gevur hesin felagskapur? Átti eg kanska at søkt um limaskap? Hvørjar eru treytirnar fyri at gerast limur?

Eg fari at byrja við tí seinasta fyrst. Einasta treyt fyri at gerast limur er, at tú smíðar løg ella orð til løg.

Í grundini er tað líka mikið um tú ert limur í KODA. Tað er tú, ið eigur rættindini til tey verk tú skapar frá tí løtu tey er vorið til. Tað vil siga, at eingin kann gerða nýtslu av tínum verkum, uttan so at tú gevur teimum loyvi til tess. Hetta er tað, ið á enskum eitur "copyright".

Í veruleikanum nyttar tað so syndarliga lítið at hava rætt sambært lógini, um tú ikki hevur møguleikar til at gera krav upp á tín rætt. Serliga innan tónleikaheimin er tað ringt at tryggja sær, at tey sum brúka orð ella løg hjá øðrum, hava fingið loyvið til tað, og at tey minnast til at gjalda ánaranum fyri tað.

Tað eru hesi rættindi KODA skal tryggja tær. Hesi rættindi hava sín prís. Fyrst vil eg vísa til lógirnar hjá KODA, sum eru prentaðar í limahondbókini og sum verða ov drúgvar at endurgeva her. Síðani vil eg vísa á eina "Medlemserklæring", sum tú verður noyddur at undirskriva, um tú ætlar tær at gerast limur. Í staðin fyri at umseta, so havi eg valt at endurgeva tað sum stendur í hesi erklæring. Hetta er tað tú skrivar undir uppá:

**Overdragelse af eneforvaltninsretten**

Jeg overdrager herved KODA eneforvaltningen af retten til offentlig fremførelse af mine værker samt eneforvaltningen af samtlige mine lydfæstningsrettigheder (retten til at overføre værket på indretninger, som kan gengive det, såsom plader, compact-discs, bånd, videogrammer, lydfilm eller enhver tilsvarende nuværende eller fremtidig indretning).

Overdragelsen omfatter ikke retten til dramatiske opførelser af operaer, operetter, musicals, balletter, pantomimer og revyteaterforestillinger.

Overdragelsen indebærer, at KODA har fuldmagt til på mine og mine arvingers vegne at påtale enhver krænkelse af disse rettigheder til mine værker og til at foretage ethvert retligt eller faktisk skridt, som måtte være nødvendigt for at beskytte disse rettigheder.

Overdragelsen giver KODA ret til at lade de omfattede rettigheder helt eller delvis repræsentere ved tredjemand såvel i Danmark som i resten af verden.

**De omfattede værker**

Overdragelsen gælder for samtlige mine musikværker og tekster, som hører til musikværker, både dem der allerede eksisterer, og dem jeg måtte skabe i fremtiden. For værker, hvor jeg allerede måtte have disponeret over de rettigheder, som omfattes af denne aftale, er KODA berettiget til at forlange, at jeg fremlægger alle oplysninger og dokumenter, som er nødvendige for at fastslå rækkevidden af sådanne dispositioner.

**Dokumentation og andmeldelse**

Jeg forpligter mig til at levere KODA anmeldelser af mine eksisterende værker og til at supplere med andmeldelser af nye værker, så snart de kommer til. Jeg forpligter mig desuden til at forsyne KODA med alle de oplysninger om mine værker, som er nødvendige af hensyn til KODA's arbejde med opkrævning, registrering og afregning.

I givet fald er jeg forpligtet til overfor KODA at dokumentere, at jeg ejer eller repræsenterer rettighederne til de værker, som jeg har anmeldt til KODA, og at alle nødvendige tilladelser fra andre rettighedshavere er indhentet. Jeg er bekendt med, at det efter KODA's love er en betingelse for at modtage vederlag for benyttelsen af et værk, at det er korrekt anmeldt.

**Fordeling af vederlag**

Jeg er indforstået med, at jeg i enhver henseende er underkastet KODA's regler vedrørende fordelingen af de vederlag, som rettighedsforvaltningen efter denne aftale kaster af sig. Dette gælder ikke kun de i KODA's love fastsatte regler, men også enhver bestemmelse i denne henseende, truffet af KODA's råd.

**Forlagsaftaler**

I den udstrækning, KODA's love og de trufne bestemmelser giver mulighed for, at jeg ved forlagsaftaler kan overdrage eller erhverve andele i vederlagsbeløb, skal der straks ske anmeldelse til KODA. Det skal i alle sådanne aftaler udtrykkeligt nævnes, at indkassering og fordeling af vederlag skal ske gennem KODA eller de med KODA samarbejdende selskaber.

**Rettighedernes overgang**

Når jeg afgår ved døden, og mine ophavsrettigheder falder i arv, er mine arvinger forpligtet til at respektere denne medlemserklæring på samme måde som jeg selv. Såfremt rettighederne falder i arv til 2 eller flere personer, er disse dog forpligtet til at udpege én repræsentant, som med bindende virkning for alle arvinger kan repræsentere dem i forhold til KODA samt modtage alle beløb, som måtte udbetales fra KODA.

Jeg er iøvrigt indforstået med, at KODA kun udbetaler til medlemmer, der har komponeret, forfattet eller forlagt de værker, som er omfattet af Crettighedsforvaltningen. Jeg er derfor afskåret fra at overdrage retten til at modtage vederlag fra KODA til tredjemand, bortset fra hvad der følger af forlagsaftaler med forlag, der er medlem af KODA eller et af KODA's udenlandske søsterselskaber.

Tað er einki KODA-umboð í føroyum í dag, men øll sum gerast limir í KODA blíva samstundis limir í *Felagið Føroysk Tónaskøld*. Hevur tú spurningar um KODA, so er Kristian Blak tann rætti at spyrja.

Ísak

# HARMONIKU-VÁNIRNAR

Tað hevur mangan verði tosa um manglandi tilgongd av ungum spælarum. Hvussu ber tað til at bara tilkomnir menn spæla harmoniku? Og er tað yvirhøðvur hugsandi at tað ungar ættarliðið tekur táttin upp?

Vit hava tosa við tveir manns, sum kunnu kasta nakað av ljósið yvir málið. Tann eini, Simme Jacobsen, hevur í mong ár verði aktivur á føroyska tónleikapallinum m.a. eisini við harmonikuni, og hevur harumframt selt ljóføri minst líks so leingi.



Hin er Martin Mouritsen, stjóri á Føroya Musikkskúla.

Harmonikan var høðvusljóðførið í dansinum í nógv ár, men Simme greiðir okkum frá at umleið 1960 kom gittarin og rock 'n' roll fram, meðan harmonikan gleið meira í bakgrundina.
Flestu okkara kenna óiva støðuna, sum er í dag: Orkestrið fær eyga á eitt eldri par í dansinum – so man tíðin vera komin at spæla nakrar gamlar dansir!
Harmonikan verður tikin fram; nakrir gamlir valsir og møguliga eisini onkur tango verða lirkaðir av, sum tá ein skrellispann við gomlum ruski skal tømast; so er tað yvirstaði.
Síðani verður harmonikan sett burtur aftur og hildið verður fram við tí *vanligu* skránni.

Sum avleiðing av broytingunum í 60'unum fóru eisini fleiri harmonikumframleiðarar á húsagang – m.a. Hagström og fleiri italienskir eisini. Simme seldi eina tíð nógvar harmonikur av merkinum Frontalini. Tá hesir fóru á húsagang vístu teir í staðin til Paolo Soprani, sum stutt eftir eisini fóru fallit.
"Síðani seldi eg bara Hohner og Weltmeister inntil eg byrjaði við Bugari. Tær vesturtýsku Hohner seldi hann orsaka av dygdini og tær eysturtýsku Weltmeister orsaka av prísinum."
Simme sigur at síðani múrurin fall, hevur Hohner keypt seg inn í Weltmeister, og at hetta samarbeiði hevur givið sera góð úrslit. Weltmeister hevur í dag eina góða harmoniku, sum rúmar meira musikki enn tær gomlu Hohner.

Hyggja vit eftir musikkskúlaskipanini, síggja vit at hon als ikki bjóðar næmingunum undirvísing í harmonikuspæli.
Martin Mouritsen sigur okkum at higartil er harmonikan ikki blivin prioritera nóg høgt, til at vera komin við í skipanina. Samstundis hevur als eingin eftirspurningur verði eftir hesi lærugrein.
Tað, sum spurgt verður eftir er sum oftast klaver. Harumframt eru serliga nógvar gentur, sum vilja spæla tvørfloytu, meðan næstan allir dreingirnir ynskja at spæla uppá el-bass. "Okkara uppgáva er so at stýra hesum, soleiðis at ikki øll spæla tað sama", sigur Martin.
Kundi tað tí ikki hugsast at harmonikan kundi verði eitt av tilboðnum, fyri at fjøltátta útboðið hjá musikkskúlanum?
Men musikkskúlastjórin væntar at nógv annað er, sum eisini stendur og bíðar, og sum verður prioritera fram um harmonikufrálæruna.

Í prátinum um hættir, sum kunnu hækka støðið innan føroyskan harmonikutónleik, segði Martin frá einum dana, Ellegård, sum undirvísti í accordion. Tað førdi við sær eina uppblussan av spælandi kreftum, men hesir tónleikarar spæla bara nýggjar kompositiónir, sum ikki eru at samanlíkna við tað vit kenna, sum harmonikutónleik.
Annars meinti Martin at um vit høvdu haft onkran, sum spældi á rættiliga høgum støði, tá kundi tað skapt íblástur til onkran ungan tónleikara, sum so setti sær sum mál at náða hesum sama støði. Spurningurin er so bara hvaðani hesin úrmælingurin skal koma.
Simme meinar at føroyskir harmonikuspælarar eru alt ov smædnir og forsmáa seg sjálvar burtur. "Teir skulu vera meira sjónligir og ikki altíð niðurpriotitera harmonikutónleikin!"

Sum er røkist ikki nógv fyri nakrari uppblomstring innan harmonikuspælið, men kanska er tað ikki so løgi kortini.
Musikkskúlastjórin vísir á at vit als ikki hava nakra instrumentala traditión innan fólkatónleik, sum t.d. norðmenn og svenskarar. Teir hava umframt dansir við ávísum dansistevum eisini traditiónfyri tónleiki við ljóðførum og harímillum eisini harmoniku. Vit hava tann føroyska dansin, ið, sum kunnugt, verður framførdur uttan nakað ljóðføri.
Sostatt hevur eingin traditión verði higartil,men allar traditiónir eru byrjaðar onkrastaðni. Kanska skuldu




vit skriva meira harmonikutónleik til fólkadansarafeløgini, so hesi saman við teirra instruktørum kunnu gera dansir til tónleikin ella øvugt. Regin Jacobsen, sum kanska er tann virknasti av øllum harmonikuspælarum í landinum, hevur longu roynt at bróta upp úr nýggjum m.a. tá hann gjørdi Vætradansin, sum Rhoda Rubeksen gjørdi stev til. Somuleiðis gjørdi Regin Jubilæumsdansin hjá Dansifrøði, sum Mia Cameron hevur gjørt stev til.
Sjálvt um føroyski dansurin av mongum verður viðfarin sum ein heilag kúgv, so hevur Regin haft dirvi til at krevja at júst føroysku dansistevini blivu tikin við í nýggju dansirnar, sum blivu gjørdir til hansara tónleik.
Kansaka kundu vit gjørt meira við henda tátt.

5)

1.Stemma

# Føðingardags valsur til Kristi (1ár)

Musik: Rene Hansen
08.02.1992

Valsur 180 BPM



# TÓNASMIÐURIN HESA FER




Navn: *Rene Hansen*
Føddur: *09.02.1973*
Bústaður: *Nólsoy*

Tann dagin Rene fylti 19 ár, fekk hann eina serliga føðingardagsgávu - dóttrina Kristi. Eitt ár seinni helt hann at *hon* skuldi hava eina serliga føðingardagsgávu, so dagin fyri 1-ára dag hennara setti hann seg við harmonikuni og løtu seinni var "Føðingardagvalsurin til Kristi" verðunleiki.

Rene er ein av okkara evnaríkastu harmonikuspælarum, og tað er altíð ein sonn fragd at hoyra hann spæla.

Tað eru tey, sum vilja verða við at hann átti at verði tvangsinnlagur á eitt konservatoriið - sjálvur finnur hann ikki uppá at gera nakað serligt við spælið.

Treyðugt so - tá Hilmar fylri 50 ár vóru vit nøkur, sum høvdu møguleika at hoyra hann spæla eitt sera krevjandi stykki, sum ikki líktist nøkrum av tí vit vanliga hoyra her um leiðir. Ein áhugaverd upliving.

Eftir at hava tikið hægri handilsprógv á handilsskúlanum í Havn er Rene farin í skrivstovulæru hjá Thomas Dam Ítrótti. Hann býr saman við Poulu og báðum døtrunum í Nólsoy.

Rene hevur stóran áhuga fyri seyðahaldi og er seyðamaður í Heimaru Helvt. Harumframt er hann vanur at verða á floti, tá veðrið er til vildar. Um tú ætlar at hitta Rene í julimánað, so er skilagott at byrja at leita Suðri í Ur. Har situr hann heilt sikkurt



við stongini og fleygar lunda.

Rene er tvíburðabeiggi við Finn, og ilt er at kenna mun á teimun. Vit,íð ikki síggja teir dagliga, kenna teir als ikki at, men spæla báðir í senn, so er eitt ið ikki er at taka feil av: Rene spælir knapp- meðan Finn spælir pianoharmoniku.

Fimmboði




